# Avmarkingar skapa avleiðingar

**– Bindingar skapa proforma. Hevur tú avmarkingar, fært tú eisini avleiðingar. Við verandi bindingum um, at fiskurin skal bjóðast út og seljast í Føroyum, sleppur marknaðurin ikki at endurspegla seg, sigur Olaf Olsen, reiðari og nevndarlimur í Fiskamarknaði Føroya**

UPPBOÐSSØLA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg trúgvi ikki, tað verður nakað øðrvísi við eini nýggjari uppboðssølu, soleingi verandi bindingar eru á sølu og keypi av fiski, sigur Olaf Olsen, reiðari*

Olaf Olsen, reiðari, hevur verið nevndarlimur í Fiskamarknaði Føroya, síðan marknaðurin sá dagsins ljós fyrst í nítiárunum. Hann hevur eisini verið nevndarformaður í felagnum í fleiri ár og eri framvegis í nevndini, nú Óli Jacobsen er nevndarformaður.

– Eg eri ikki so samdur við Árna Joensen, formanni í Ráfiskaseljarafelagnum, men taki hinvegin undir við tí, sum John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya, sigur um viðurskiftini.

### Skapa proforma

Olaf sigur, at nevnd og leiðsla hava ongantíð ynskt sonevndu proforma-sølurnar, sum vit dagliga hoyra um, men hesar eru tvingaðar inn á felagið við teimum politisku bindingunum, sum liggja á fiskasølu og fiskakeypi í Føroyum.

– Bindingar skapa proforma, tá ið lítið fæst fyri fiskin. Í stuttum kann sigast, at hevur tú avmarkingar, so fært tú eisini avleiðingar. Við verandi bindingum um, at fiskurin skal bjóðast út og seljast í Føroyum, sleppur marknaðurin ikki at endurspegla seg. Tí fært tú virðisbroytingar.

Reiðarin heldur, at samrøðan, sum Sosialurin hevði við Árna Joensen leygardagin, byggir ov nógv á forhonds-treytir, t.v.s. treytir, sum ikki eru galdandi í dag.

– Eg trúgvi ikki, tað verður nakað øðrvísi við eini nýggjari uppboðssølu, soleingi verandi bindingar eru á sølu og keypi av fiski.

Olaf sigur, at verða broytingar framdar, sum loyva útlendingum at bjóða uppá fiskin, sum boðin verður út í Føroyum, henda eisini broytingar við verandi uppboðssølu.

– Kemur ein nýggj uppboðssøla sum við færri bindingum fer at virka betur enn verandi, høvdu hesar broytingar eisini komið við Fiskamarkamarknaði Føroya.

Reiðarin heldur tí, at Árni tosar um viðurskifti, sum ikki eru galdandi í dag.

– Men verða hesi viðurskifti broytt, hava vit jú eina heilt aðra støðu og heilt aðrar møguleikar, leggur hann dent á.

Fáa vit tvær uppboðssølur, heldur Olaf, at vit neyvan fara at hava tvær uppboðssølur leingi, tí tá fer onnur helst at halda uppat aftur, áðrenn langt um líður.

### Uttanlandssølur

Olaf Olsen heldur tað vera spell, at marknaðarprísirnir á upsavørum skulu vera so lágir.

– Tað er keðiligt, at tað ikki gongur betur hjá virkjunum. Men er gongdin trupul hjá virkjunum, er hon tað so sanniliga eisini hjá skipunum, sum serliga fáa so lítlan prís fyri upsa.

Reiðarin vísir á, at skipini klára seg ikki sum er.

– Eg haldi ikki, at úrslitið av beinleiðis sølum uttanlands, er serliga gott. Hetta er í hvussu er ikki tær royndir, vit hava. Okkara skip hava verið uttanlands nakrar ferðir, men tað er næstan ikki komið fyri, at hetta hevur loyst seg betur enn at leggja fiskin upp í Føroyum.

Hann vísir á, at prísirnir á marknaðunum uttanlands vanliga er ógvuliga skiftandi, og tað kostar so sanniliga eisini at landa og selja fiskin í øðrum landi.

– Vit missa fiskidagar, og haraftrat kostar tað at sigla, sigur hann.

Olaf Olsen sigur, at P/F Beta hevur ikki havt góðar royndir av at sigla av landinum við fiskinum.

– Tað hevur loyst seg betur hjá felagnum at lagt fiskin upp, koyrt hann í bingjur og sent hann av landinum, sigur reiðarin og nevndarlimurin í Fiskamarknaði Føroya.

# Eitt trupult ár hjá partrolarunum

**– Eg vænti, at hetta verður eitt trupult ár hjá partrolarunum. Um vit kunnu vænta tvingsilssølur, veldst um, hvussu væl skipini og reiðaríini eru konsolideraði, sigur Olaf Olsen, reiðari**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Við verandi gongd verður eingin peningur spardur upp til íløgur í nýggj skip, sigur Olaf Olsen, reiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er torført at gera sær eina veruliga mynd av upsaprísunum, tí nógvur fiskur verður keyptur á uppboðssølu, sum fer óvirkaður av landinum. Prísirnir eru tískil ikki eftirfarandi, tí í nógvum førum verður fiskurin keyptur av teimum somu, sum bjóða hann út. Síðan verður hann seldur av landinum.

Olaf Olsen, reiðari, heldur, at miðalprísurin á upsa í løtuni liggur um 3,50-4 krónur fyri kilo, og tað er kanska eitt vet hægri, enn hann hevur verið.

– Eg haldi, at prísurin var komin so langt niður, sum hann kundi koma, og tí er hann nú kvinkaður eitt pinkalítið sindur. Vit skulu helst eini 20 ár aftur í tíðina fyri at finna ein so lágan upsaprís, sum hann hevur verið nú í longri tíð.

Reiðarin vísir á, at prísurin á upsanum veldst eisini um støddina, og upsin hevur leingi verið ógvuliga smáur.

### Nógv reyðæti

Hann sigur, at slagið plagdi at verða betur, tá ið skipini royndu á djúpari vatni, men hetta vísir seg ikki at gera nakran serligan mun nú.

– Nú royna skipini vanliga á 200-250 favna dýpi, og her plagdu tey at fáa frægari slag. Kanska er slagið heldur frægari, men munurin er lítil.

Olaf sigur, at nógv hevur verið til av smáum upsa og spurdur, hvar tann stóri fiskurin er, sigur hann, at tað hevur hann einki boð uppá.

– Eg haldi, at fiskurin veksur eitt sindur seinni nú, enn hann hevur gjørt, tá ið umstøðurnar eru betur. Hinvegin siga teir, sum sigla við skipunum, at nógv reyðæti hevur verið at sæð seinastu tíðina í mun til fyrr í vetur, tá ið einki var at síggja. Vit kunnu tí vóna, at náttúruviðurskiftini aftur fara at laga seg sum frægast, so fiskurin fær nóg mikið at eta.

### Trupult ár

Reiðarin sigur, at trolararnir, Bakur og Stelkur, hava fingið umleið somu nøgd higartil í ár sum í fjør, men miðalprísurin hevur verið lægri í ár.

Hann vísir á, at partrolarar partvís hava roynt eftir hvítum fiski, nú upsaprísurin hevur verið so lágur, men hann ivast í, um hvíti fiskurin kompenserar fyri tað, skipini missa í upsanum, tí nøgdirnar av upsa hava verið so stórar.

– Hetta kann eydnast viðhvørt, men spurningurin er, hvat roynist í longdini, sigur reiðarin.

Samanumtikið væntar Olaf, at hetta árið verður trupult hjá partrolaraflotanum við áhaldandi lágum upsaprísum.

– Eg vænti, at tað verða fleiri skip, sum ikki fáa endarnar at røkka.

Spurdur, um hann væntar tvingsulssølur, sigur hann, at hetta veldst um, hvussu væl skip og reiðaríir eru konsoliderað tey árini, raksturin gekk betur.

– Men tað er greitt, at við verandi gongd verður eingin peningur spardur upp til íløgur í nýggj skip, sigur Olaf Olsen at enda.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Heilsuhjálparar fingið prógv



*Hesar hava fingið prógv sum heilsuhjálparar á Heilsuskúlanum á Tvøroyri.*

*Aftast frá vinstru: Ása Holm Porkeri, Annika Justinussen Hoyvík, Jensina av Húsabrúgv Argir, Kristina Johansen Nólsoy, Ruth Berg Hvalba, Mary Hansen Miðvágur, Anna Maria Høgnisen Hósvík, Ása Brattaberg Vágur, Ingeborg Simonsen Hoyvík, Bergtóra Danielsen Saltangará, Svea Durhuus Vestmanna, Elken Simonsen Hvannasund, Mia Olsen Strendur, Elsuba Petersen Viðareiði og Sigrun Petersen Fuglafjørður.*

*Fremst frá vinstru: Gudrun Jacobsen Sørvágur, Jacobina Niclasen Hvannasund, Elin Hansen Glyvrar, Berghild Olsen Trongisvágur og Katrin Olsen Eiði*

Útvarp Føroya:

# Barometrið er byrjað aftur



*Reportararnir á Barometrinum, Kári Sólstein og Heri Jacobsen, við nýggja Opel Zafira OPC, sum P/F Meinhardt Arge hava sponsorerað til sendingina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Barometrið, væl umtókta sendingin hjá Útvarpi Føroya, byrjaði aftur týsdagin 1. juni. Eins og undanfarin ár verður talan um lættar og undirhaldandi sendingar**

Ein kanning, sum bleiv gjørd í fjør, vísti, at Barometrið hevur flest lurtarar aftaná tíðindi hja Útvarpi Føroya.

Eins og undanfarin ár verður talan um lættar og undirhaldandi sendingar. Á skránni verða firmakappingar og aðrar spurnarkappingar. Sum nakað nýtt verður nú eisini ringt til ávísar kendar persónar, sum lurtararnir sjálvir skulu tosa við og finna út av hvør hann ella hon er.

Vertirnir á Barometrinum eru: Rúni Jákupsson og Bjarni Mohr, og reportarar eru: Kári Sólstein og Heri Jacobsen.

Barometrið verður sent týsdag til fríggjadag frá kl. 15-17. Sent verður til fyrstu vikuna í september.

## Tøkk

Hjartaliga takka fyri sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Bette Nysted Hansen**
Leirvík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum. Tøkk til Bjarna Bæk, dómpróst, Una Næs, prest og Sylverius Jacobsen fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.

Tøkk til sangarar og gravarar. Tøkk til Missiónshúsið og øll tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina. Tøkk fyri uppringingar og blómur og kransar og tøkk øll tit, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*

**Karl, Jógvan, Rasmus, Nella og Sverri**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona mín

**Maria Holm Marstein**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til heimarøktina og til tykkum á Lágargarði, sum vísti henni kærleiksfulla umsorgan.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til barnalegurnar á Zarepta og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

**Hákun**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu tá okkara góða kona, mamma, omma, langomma og olduromma

**Sanna við Garð**

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri køkur, blómur, kransar og minnisgávur til Sambýlið á Heygnum.

Ein serlig tøkk til heimasjúkrasystrar og starvsfólkið á Sambýlinum á Heygnum.

*Familjunnar vegna*

**John**